UTTAN ÚR HEIMI

Afghanistan sleppur undan hungursneyð

Takkað verði størsta altjóða hjálpartiltakinum seinastu 40 árini sleppur afghanska fólkið eftir øllum at døma undan hungursneyð í vetur.

ÚTLAND
Fartekst

Seinastu tríggjar mánaðarnar hava afghanar fingið meira enn 200.000 tons av mati og aðrari neyðhjálp. Umleið tveir triðingar av hjálpini er komin úr USA.

Matvøruhjálpin hjá ST, WFP, hevur lagt flutningin og býtið til rættis, og hetta hevur verið tað truplasta og vandamesta arbeiðið, sum WFP hevur havt, síðani deildin varð skipað fyri 40 árum síðani.

Neyðhjálpin til Afghanistan hevur verið støðugt veksandi, síðani kríggið byrjaði eftir yvirgangsatsóknirnar í USA tann 11. september í fjør. Longu í september komu 11.000 tons av mati og øðrum neyðsynjarvørum til Afghanistan, í oktober var nøgdin 27.000 tons, í november 55.000 tons, og í síðsta mánað vórðu heili 116.000 tons av neyðsynjarvørum send til tað illa stadda landið.

Umframt mat og aðrar neyðsynjarvørur hava afghanar fingið umleið 20.000 útvarpstól. Tey eru komin úr USA, men talsmaðurin hjá amerikanska hjálparstovninum USAID sigur, at ætlanin við tólunum var ikki at lata afghanar hoyra amerikanskar propagandasendingar um kríggið ímóti Taliban og al-Qaeda. Tvørturímóti skuldu útvarpstólini gera tað møguligt hjá fólki at frætta tíðindi um hjálpartiltøk og støðuna í landinum, eins og fleiri sendingar um heilsumál hava verið á skránni.

Færri flóttafólk

Ein orsøk til at veturin ikki er vorðin tann vanlukkan, sum fólk og felagsskapir stúrdu fyri, er, at talið á afghanskum flóttafólkum er ikki so stórt sum upprunaliga hildið. ST roknaði í september við, at umleið hálv onnur millión fólk fóru at flýggja orsakað av krígnum, men sambært amerikanska uttanríkisráðnum eru flóttafólkini um 150.000 í tali.

Her er bert talan um teir afghanararnar, sum flýddu heiman, men sum tó ikki rýmdu av landinum.

Talið á afghanskum flóttafólkum, sum fóru til grannalondini og serliga Pakistan, er nógvar ferðir størri.

USA fyrireikar álop á Somalia

Amerikanska flogvápnið hevur økt rannsóknarferðirnar yvir afrikanska landinum og fyrireikar álop á støðir hjá al-Qaeda.

ÚTLAND
Fartekst

Tað er blaðið Washington Times, sum ber tíðindini um eitt ætlað amerikanskt álop á Somalia. Blaðið sigur seg hava tíðindini frá keldur í verjumálaráðnum Pentagon, sum siga, at Somalia er tað næsta álopsmálið, tá bumbuálopini í Afghanistan eru av.

Sambært amerikanarum eru umleið 100 menn úr al-Qaeda sæddir í Somalia. Teir eru limir í felagsskapinum Al-Ittihad Al-Islam, sum sigst vera undir leiðslu av av somaliska ættarbólkaleiðaranum Hussein Mohammed Aideed.

Sambært Washington Post hava amerikansk, bretsk og fronsk flogfør økt rannsóknarferðirnar yvir Somalia seinastu vikuna. Uppgávan hjá flogførunum er at skráseta møgulig bumbumál, skrivar blaðið.

Nú er aftur bíligari at liva í Føroyum

Seinastu tíðina er maturin blivin eitt sindur bíligari, men hinvegin er húsaleigan hækkað nokk so fitt

KOSTNAÐARSTØÐI
Áki Bertholdsen

Prístalið útgreinað á 12 høvuðsbólkar, 1. apríl 2001 = 100

Nr.	Vørubólkur	Lutfall	1.juli 2001	1.okt. 2001	1.jan. 2002
01	Matur og drekka	21,3	101,3	102,4	102,1
02	Rúsdrekka og tubbak	5,9	100,0	100,1	100,1
03	Klædnavørur og fótbúnaður	5,4	99,9	100,8	101,1
04	Býli	20,2	100,8	98,6	92,5
05	Innbúgv, húsbúnaður o.l.	6,0	100,6	100,6	100,9
06	Heilsa	2,8	100,0	100,0	99,8
07	Flutningur	13,1	99,7	96,1	97,7
08	Samskifti	4,6	94,8	94,7	95,9
09	Frítíð og mentan	11,9	102,0	101,6	103,3
10	Útbúgving	0,1	100,0	104,1	104,1
11	Hotel og matveitarar	3,6	102,6	105,7	106,3
12	Ymiskar vørur og tænastur	5,3	100,4	100,7	101,6
	Samanlagt	**100,0**	**100,5**	**100,0**	**99,3**

Tað eru kanska ikki øll sum trúgva tí, men hesa seinastu tíðina er tað blivið eitt sindur bíligari at búgva í Føroyum.

Tað vísa tey turru tølini hjá Hagstovu Føroya.

1. apríl í fjør fingu

4. ársfjórðing 2001 fór prístalið 0,7 prosent niður, soleiðis at tað 1. januar 2002 er 99,3.

Eins og ársfjórðingin frammanundan er tað mundandi rentulækking á sethúsalánum og lægri brenniolju- og bensinprísir, ið togað prístalið niðureftir.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu gongdin hevur verið í 12 høvuðsbólkum síðan 1. apríl, tá nýggja prístalið varð roknað fyrstu ferð.

Mat- og drekkavøruprísirnir eru lækkaðir 0,3 prosent. Tað eru serliga lægri grønmetisprísir, ið hava ávirkað prístalið niðureftir fyri henda bólk.

Prísirnir á klædnavørum og fótbúnaði eru farnir 0,3 prosent upp. Sama er galdandi fyri bólkin innbúgv og húsbúnað.

Prístalið fyri býli er farið góð 6 prosent niður. Hesin bólkur er samansettur av húsaleigu, rentuútreiðslu á sethúsalánum, viðlíkahaldi á bústað, ravmagn og hita. Tað er rentulækkingin, sum hevur havt størstu ávirkanina í hesum bólki.

Húsaleigan, sum verður gjørd upp eftir gongdini í sethúsaprísunum, er harafturímóti farin 4 prosent upp. Útreiðslurnar til viðlíkahald eru vaksnar gott prosent. Meðan prísurin á brenniolju til húsarhald er farin 5,6 prosent niður.

Prísurin á bensini í bólkinum flutningur er lækkaður góð 3 prosent. At prístalið fyri henda bólk samanlagt kortini er farið nakað upp kemst serliga av, at prísirnir á bilum og verkstaðartænastum eru uppfarnir.

Eisini gjøld fyri aðrar tænastur, so sum postgjøld í bólki 8, frítíðarferð uttanlands í bólki 9 og barnaansing og hárfríðkan í bólki 12 eru farin upp.

Polarhav og Stjørnan rokfiskiskap

- Um farið verður beinleiðis nýggjan túr — ella, um farið verður til lands at skifta fólk, veldst um, hvussu fiskiskapurin verður, tá ið skipini koma aftur í føroyskan sjógv, sigur Tummas Justinussen

Fingu 340.000 pund av upsa í fýra dagar! – Tað er í minsta lagi eitt ár, síðan skipini landaðu uttanlands seinast, men nú fara vit so aftur at gera eina roynd, sigur Tummas Justinussen.

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Í nøgd var hetta ein góður túrur hjá Polarhavi og Stjørnuni, ið helst vóru tey einastu føroysku ísfiskaskipini, sum fóru útaftur millum jól og nýggjárs.

Ætlanin var at fara 26. desember, men neyðugt varð at boðsenda elektrikarum at gera onkrar smávegis umvælingar umborð á Polarhavi, áðrenn teir kundu loysa. Skipini fóru tí ikki útaftur fyrr enn 28. desember.- Skipini fiskaðu í fýra samdøgur. Tey royndu eystanfyri, og nú Polarhav og Stjørnan stevndu móti Hanstholm, vóru 340.000 pund av upsa í lastini!

Tummas Justinussen sigur, at rættiliga nógvur upsi var at fáa, men at fiskurin var smáttfallandi.

Eingi føroysk skip vóru á leiðini, men ein norskur línubátur setti tann eina dagin á somu leið.

Ein roynd

Hann sigur, at tað er í minsta lagi eitt ár, síðan Polarhav og Stjørnan landaðu uttanlands seinast, og tí er ilt at meta um, hvussu sølan verður.- Tað kann fara báðar vegir, men hetta er so ein roynd. Hetta skuldi verið besta tíð, men eg tori einki at siga fyrr enn mánadagin, tá ið vit kenna prísirnar.

Tað eru einir 30-40 tímar longri at sigla til Hanstholm enn til Scrabster, men sum skilst á Tummasi, er upsamarknaðurin í Danmark munandi betri enn í Skotlandi.

Spurdur, um teir kundu vænta sær betri prís í Føroyum nú beint eftir ársskiftið enn fyri jól, heldur Tummas, at tað høvdu teir ivaleyst, tí nú er eingin fiskur á føroyska marknaðinum.

- Men hetta er so bara ein roynd, sigur hann og endurtekur, at tað er íminsta lagi eitt ár, síðan skipini landaðu uttanlands seinast.

Tvær manningar

Ætlandi skuldu skipini verða í Hanstholm fríggjamorgunin. Tey steðga stutt; fara helst útaftur longu fríggjakvøldið.

- Um farið verður beinleiðis nýggjan túr — ella, um farið verður til lands at skifta fólk, veldst um, hvussu fiskiskapurin verður, tá ið skipini koma aftur í føroyskan sjógv.

Tummas Justinussen sigur, at tríggjar manningar eru knýttar at Polarhavi og Stjørnuni, og eftir røttum skuldu teir skift fólk, tá ið hesin túrurin er av.

Abbasonurin bjargaði húsunum

ELDSBRUNI
Ingrid Bjarnastein

Eldur var í einum húsum í Sigmundargøtu í Havn hóskvøldið. Hevði abbasonurin ikki verið so kvikur við eldsløkkjaranum, høvdu húsini verið nógv verri farin

Mynd: Álvur Haraldsen

Hóskvøldið um 19.30 tíðina kom eldur í eini hús í Sigmundargøtu í Havn. Jólatræið í stovuni við livandi ljósum var koppað, og eldur var komin í teppið og breitt seg uppeftir vegginum. Eitt gamalt par búði í húsunum.

Av tí, at brandmenninir av tilvild vóru á mánaðarligari venjing á brandstøðini hetta kvøldið, gingu bert tveir minuttir frá tí, at eldurin varð fráboðaður, til teir vóru á staðnum. Um allir brandmenninir ikki av tilvild høvdu verið samlaðir, hevði tað tikið minst fimm minuttir meira til teir komu fram, og er hetta rættiliga nógv tá talan er um eldsbruna.

– Men tað er abbasonurin, sum eigur allan heiðurin og æru fyri, at húsini standa, sigur vakthavandi á brandstøðini í Havn.

– Hevði abbasonurin ikki verið so kvikur við eldsløkkjaranum, so høvdu húsini verið nógv verri farin. Hann hevði fyrst roynt við vatni, og síðani var hann farin eftir einum eldsløkkjara, og harvið megnað at dempa eldin og hildið honum niðri inntil vit komu á staðið.

Stovan er rættiliga illa farin av eldi og hita, meðan restin av húsunum hevur fingið stóran roykskaða.

Vakthavandi á Brandstøðini sigur, at óvanliga nógvir eldsbrunar hava verið í Havnini seinastu tíðina. Annars er talið á eldsbrunum farið niður í helvt síðani í 80´unum, men bert í desember-mánaði hava verið tríggir eldsbrunar í Havn, har húsini eru so at siga vorðin totalskadd. Vakthavandi heldur, at grundin til, at talið av eldsbrunum er minkað er, at fólk hava roykávaringar, og fólk eru vorðin meira tilvitað um sløkkiútgerð.

Minst ein roykávaring og sløkkiútgerð skuldi verið í øllum húsum, sigur vakthavandi.

Petur Seloy, brandmeistari:

Kundi verið verri

– Um eldurin hevði verið inni í tunnlinum, er ringt at ímynda sær, hvat vit høvdu kunnað gjørt, sigur Petur Seloy, brandmeistari. Ongin útgerð er til eldsløkking í tunnlunum, og tí kundi skaðin verið nógv størri um bussurin brendi inni í sjálvum tunnlinum

TRYGD OG TUNNLAR
Ingrid Bjarnastein

Petur Seloy, brandmeistari sigur, at um eldurin hevði verið inni í tunnlinum, høvdu brandmenninir neyvan kunnað gjørt nakað, vegna vantandi trygdarútgerð

Eldurin í líðbussinum hjá Bygdaleiðum nýggjársaftan hevur rør uppundir eitt upplagt orðaskifti: Er trygdin í tunnlunum í Føroyum nóg góð?

Petur Seloy, sum er brandmeistari, sigur, at í Føroyum hava vit onga greiða linju yvir tunnlarnar, og at ein vanlukka sum henda varð væntandi.

– Vit hava arbeitt við einum uppskotið til betri trygd í tunnlum nú í eini trý ár, sigur Petur Seloy.

– Hetta uppskot varð tó ikki liðugt fyrr enn nú beint fyri jól. Men tað vísir seg, at tað er ofta langt frá hugsan til handling. Ongi úrslit eru komin burturúr enn, og tað er eisini ringt at siga, hvør tað er, sum eigur at taka avgerðirnar um, hvat tað er, ið skal gerast.

Trygdarútgerð

Í teimum føroysku tunnlunum er ongin trygdarútgerð. Petur Seloy sigur, at um eldurin hevði verið inni í tunnlinum, so er ringt at ímynda sær, at brandmenninir yvirhøvur høvdu kunnað gjørt nakað.

– Onki vatn er í tunnlunum, og heldur ongin onnur trygdarútgerð sum heild, greiðir Petur Seloy frá.

– Tá ið okkara brandmenn fara inn í tunnilin missa vit eisini radio- og telefonsambandið, so vit fáa ikki tosa saman. Tað sum vantar er trygdarútgerð, sum til dømis neyðtelefonir, vatn, ventilatiónsskipan, neyðútgongdir, bummar, sum fara niður tá ov nógvur roykur er í tunnlinum og líknandi. Alt hetta skuldi verið gjørt tá tunnlarnir av fyrstan tíð vóru bygdir, men slíkt er tikið burtur vegna ov lítið av peningi, og trygdareftirlitið, sum hevur verið tikið í er, hvussu nógvir bilar koyra gjøgnum tunnlarnar í miðal um dagin.

Ábyrgdin ikki hjá kommunum

Tunnlarnir liggja undir Landsverkfrøðinginum, men tað tykist hóast alt, at teir eru eitt slag av ongamannalandi. Kommununar hava ikki pening ella orku til, at serútgera seg innan tunnlarnar, og tað hevði eisini verið órættvíst, um til dømis Kvívíkar Kommuna skuldi goldið fyri allar útreiðslurnar bæði av Undirsjóvartunnlinum og Leynatunnlinum. Hetta skuldi verið eitt landsuppgáva, har myndugleikarnir taka ábyrgdina og seta krøvini.

Brandlógin sigur, at Landets Brandinspektion kann fara inn og stilla krøv til Landsverkfrøðingin um, at trygdin í tunnlunum skal betrast. Men tá Landets Brandinspektion liggur, sum ein deild undir Landsverkfrøðinginum, ger tað ikki altíð so lætt at seta krøv til egnan stjóra.

Serútbúgvið fólk

Fyri at fáa eina so góða trygd sum møguligt, er brúk fyri at hava serútbúgvið fólk at sløkkja eldar í tunnlum. Men í Føroyum eru ongi fólk, sum eru serútbúgvin til hetta endamálið.

– Hetta er eisini ætlanin at fáa, sigur Petur Seloy. – Ætlanin er at útbúgva fólk, sum so kunnu gera eitt samlað útkall, og síðani eisini kunnu fara út og læra onnur um hetta.

Fólkini skulu vera serútbúgvin til at fara inn í tunnlarnar, men tað er ikki nóg mikið við fólkum, tí tað ber, væl at merkja, ikki til, at sløkkja eld við ongum vatni. Rætta trygdarútgerðin er eisini alneyðug í hesum sambandi. Haraftrurat skulu tað eisini aðrir tekniskir hentleikar stillast upp soleiðis, at brandmenninir fáa tosa saman – eisini tá teir eru í tunnlinum.

Tosað hevur verið um at taka tunnlarnar stig fyri stig, og soleiðis byrja við einum tunnli og gera hann til ein modeltunnil, og síðani breiða tað út til restina av tunnlunum kring landið.